Kirkjubøar kommuna sóknast eftir

Leiðara og 3 pedagogum

til Barnagarðin á Velbastað

Pedagogar

Vit sóknast eftir trimum pedagogum, einum til hvørja stovu.

Høvuðsuppgávan er at skapa fastar, tryggar karmar um dagin hjá børnunum, og við spæli og øðrum tiltøkum, t.d. húsligum uppgávum, at hjálpa børnunum at mennast sum einstaklingar og sum partar av størri heildum.

Arbeiðið fevnir um planlegging, praktiskar uppgávur í sambandi við máltíðir og ansing annars, og um íverksetan av tiltøkum og spølum.

Førleiki

Umsøkjarar mugu hava pedagogiska útbúgving. Royndir innan arbeiði í vøggustovu/barnagarði eru ein fyrimunur, men ikki fortreyt.

Annars er av týdningi, at umsøkjarar kunnu arbeiða sjálvstøðugt, hava góð samstarvsevni og vilja vera við til at seta sín dám á stovnin.

Setanarviðurskifti

Størvini eru frá 1. juni 2002 ella skjótast til ber. Tó kunnu vit bíða eina tíð eftir tí rætta umsøkjaranum. Arbeiðstíðin kann vera 40, 35 ella 30 tímar um vikuna. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/kommunurnar. Í umsóknini kann vera tilskilað, um umsøkjarin hevur ynski um at arbeiða í ávísari stovu.

Leiðari

Sum leiðari fært tú her møguleika at gera hugsanir tínar til veruleika um, hvussu ein barnagarður gerst eitt vælvirkandi námsfrøðiligt tilboð í nærumhvørvinum. Arbeiðsøkið hjá leiðaranum er at leggja ætlanir fyri árið og leiða dagliga virksemið í samsvari við pedagogisku stevnuna hjá stovninum.

Uppgávurnar fevna um upptøku av børnum, fíggjarstýring (bókhald og ársroknskapur verða gjørd av kommununi), at skipa dagliga virksemið, vaktir og innkeyp, at umsita starvsfólkaviðurskifti so sum starvssetanir, lønir, farloyvi, skeið v.m., samstarv og kunning við foreldur, foreldra- og bygdarráð og samskipan av felags tiltøkum annars.

Leiðarin hevur ábyrgd av, at skipanir eru, sum lúka almenn krøv, t.d. innan trygd og heilsu. Umráðandi er, at leiðarin alsamt dagførir sína vitan á námsfrøðiliga økinum.

Førleiki

Leiðarin má hava pedagogiska útbúgving og hegni og áhuga fyri leiðslu. Til ber at víkja frá útbúgvingarkravinum, men umsøkjari má skjalprógva aðra viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndir.

Setanarviðurskifti

Starvið er frá 1.juni 2002, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum. Lønin verður eftir avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið/kommunurnar. Harumframt er møguleiki at tingast um viðbót.

Vit hava um neyðugt pláss á stovninum fyri børnum teirra, sum sett verða í leiðarastarvið og pedagogstørvini.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Elina Henriksen, leiðara, á tlf. 328121 / velbarn@post.olivant.fo ella Óluvu Niclasen, bygdarráðslim, á tlf. 328145 / oluvanic@hfs.fo

Umsókn

Umsókn saman við prógvum og upplýsingum um royndir skulu sendast Kirkjubøar kommunu v/Annfinn Brekkstein, 176 Velbastaður innan **1. apríl 2002**.

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Barnagarðurin á Velbastað er ein kommunalur stovnur við einari fíggjarætlan uppá 2,3 milliónir árliga. Stovnurin liggur í friðaligum umhvørvi við stórum spæliplássi og haganum rundanum.

Har eru 40 børn av Velbastað, úr Kirkjubø, úr Syðradali og úr Havn. Børnini eru millum 1/2 og 9 ár og eru í trimum stovum, har aldursbýtið er 0-2 ár, 2-4 ár og 4-9 ár. Tað eru 11 starvsfólk, svarandi til umleið 9 fulltíðarstørv.

Endamálsorðingin hjá stovninum er frá 1997 og soljóðandi: "Endamálið er at skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar, bæði kropsliga og sálarliga og tryggja, at børnini faa nógvar og ríkar upplivingar. Vit ynskja, at børnini ótarnað skulu sleppa at spæla; harumframt skulu tey sleppa at vera við til at taka avgerðir, og starvsfólkini skulu lurta eftir teimum og geva sær stundir til tey."

Bilur við skaða til sølu

Merki: Hyundai Accent
Árg.: 1997
KM.: 66.100

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345629 · fax 345607
e-mail: hw@trygging.fo
at hitta: mánadag-hósdag kl. 08.30-10.00
og 15.00-16.00
fríggjadag 08.00-12.00 og 13.00-16.00

Vit sóknast eftir

Feriuavloysarum til handilin

Arbeiðtíðirnar eru hesar:
kl. 06.00 – 13.00
kl. 13.00 – 19.00
kl. 19.00 – 23.30
allar dagar í vikuni

Løn eftir S&K

Frants Restorff
Tórsgøta 13
Tlf. 311060
Postmoga 41
110 Tórshavn

frants restorff

Bilur við skaða til sølu

Merki: Ford Mondeo Flair 1.8 bensin – 5 hurða, svartur
Árg.: 1997
KM.: 66.300

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
Tlf. 345771 • Fax 345607
t-postur: bjb@trygging.fo
at hitta mánadag – hósdag millum kl. 08^{30}–10^{00}
og fríggjadag millum 08^{30}–16^{00}

Taljur
Stroppar
Trýst-slangur
Spuli-slangur

Tórshavnar Maskinhandil
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
10 Tórshavn - Tlf. 313442

Vaskikona

Søkt verður eftir vaskikonu at byrja beinanvegin.

Klaksvíkar Klubbi
Uppsalagøta 11 · Box 182
Klaksvík

www.sosialurin.fo

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TOYOTA CARINA 1.6
st.car, hevur koyrt 155.000, er sera væl viðfarin og er í sera góðum standi. Selist nýsýnaður, árg. 90.
Tlf. 220564 ella 447221

HEVUR NAKAR
ein kólara til ein Mazda 929 st.car. árg. 88 at selja mær.
Ring 373169 ella ella 250213

OPEL VECTRA
árg. 12/88, er í góðum standi, men krevur ábøtur. Sýnaður 1.3.2002 til sølu.
Tlf. 313790 ella 220405

ROVER 200
2 ár, 25000 km, hevur el-rútar, sentrallás, powerstýring, ABS, CD-spælara, sportfelgur + píkadekk á felgum. Verður seldur vegna keyp av størri bili.
Tlf. 213660

VW-TRANSPORTARI
árg. 92, hvítur 2400 diesel, til sølu. Koyrt 153.000 km.
Tlf. 211770 ella 283868

KØLI- FRYSTIVOGNAR
til sølu. MAN 19-322 2 aksl. MAN 22-370 3 aksl.
Tlf. 222774

YNSKIST TIL KEYPS
Høgra lykt framman til Citroen ZX, ynskist til keyps.
Tlf. 332830 eftir kl. 18

TIL SØLU
Ymisk nýggj dekk til persón og vørubílar bíliga til sølu.
Tlf. 217778 ella 218778

FORD ESCORT 1.3
árg. 86, í góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 253021

TOYOTA CARINA
árg. 89, T171, ongar plátur, koyrir væl, hevur fýra nýggjar sporttfelgur við nýggjum dekkum, verður seldur um hóskandi boð fæst.
Tlf. 215984

BRÚKT DEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk við felgum stødd 165/13 200 kr. stk. Fýra summardekk u/ felgur stødd 165/13 150 kr. stk. Eitt summardekk 155/13 v/ felgu 100 kr.
Ring á 443328 ella 260249

HURÐAR
til Audi 80, árg. 86-91 og til VW Golf II, árg. 84-91 og Nissan Patrol, árg. 84-92.
Tlf. 217778 ella 218778

YNSKIST TIL KEYPS
Volvo 340 DL við fronskum motori.
Tlf. 424270 - 286504

NISSAN PATROL
árg. 96, koyrt 162.000 km, til sølu. Prísuppskot 150.000 kr. Kann síggjast hjá Super Dekk.
Tlf. 227989

KASSAVOGNUR
v/ lyft til sølu. VW LT. 35, árg. 92. (Lítla koyrikortið).
Tlf. 222774

PERSÓNVOGNUR TIL SØLU
Nissan Sunny, 4 hurðar, sedan, árg. 89, í góðum standi.
Tlf. 222774

TIL SØLU
Brotin motorblokkur við nýggjum krumtaksaksli og nýggjum leigum, til VW Golf, árg. 92, TD 19, bíliga til sølu.
Tlf. 375186

DEKK TIL SØLU
4 aummardekk stødd 205/65-15 bíliga til sølu.
Tlf. 211990

VW PASSAT TDI
árg. 98, 110 HK, Trendline, koyrt 97.000 km til sølu.
Tlf. 421415 ella 261123

DAIHATSU CHARADE G100
Sýnaður 3/02, ongan kross, í góðum standi, árg. 89, km 120.000. Til sølu um hóskandi boð fæst, møguliga brúktur bilur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 228347

MAZDA 626
til sølu. Hevur el-rútar, centrallás við fjarstýring, sleipikrók og er sýnaður í mai 2001. Krevur smáar ábøtur. Bilurin er árg. 87, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 227112

OPEL COMBI 1.4i
árg. 96, koyrt 56.000 km. Hevur hillasystem aftan, vælegnaður til elektrikarar, kostnaður: 55.000 kr.
Tlf. 328120 ella 258523, Bogi

CITROËN XANTIA HDI
árg. 99 til sølu um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri á
tlf. 423341 eftir kl. 16, Jónsvein

SUMMARDEKK
Fýra lítið brúkt summardekk á felgum 165/70 R14 til sølu.
Tlf. 228189

BILUR
til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 224666, e. kl. 15

TOYOTA COROLLA
árg. 87, til sølu.
Tlf. 314465 / 253443

TIL SØLU
Mitsubishi Lancer, diesel, árg. 87, við píkadekkum, bíliga til sølu.
Tlf. 421451 / 253478

OPEL ASTRA 1.7
turbo diesel, árg. 97, til sølu. Koyrt 127.000 km, hevur el-spegl v/ hita, cd-spælara, 15" sportsfelgur og píkadekk við felgum, hevur vel, sær gott út og er væl hildin.
Tlf. 255467

MAZDA 323 GTI
1,6, 118 HK, sýnaður 10/11-2001, til sølu. Ring og fá meira at vita.
Tlf. 251439

CITROËN B X 16, TRS,XB
árg.88, til sølu fyri 5500 kr. ella hægstbjóðandi. Hóast bilurin hevur ein oljuleka og defekt bremsurør, er hann í góðum standi. Kann eisini nýtast sum eykalutur.
Tlf. 321157 ella 224606

Amboð

SPROYTUKABINA
Blowtherm EF750 l. 7,50 x b. 3,96 x h. 2,70 til sølu um hóskandi boð fæst. Umframtein Car-O-Liner uppréttarabonkur.
Tlf. 217778 ella 218778

TIL SØLU
Bil lyfta til sølu. Væl egna til garagu. Lyftir uml. 1 metur.
Tlf. 211990

AMBOÐ

· Tvangsblandarir
· Blandimaskinur
· Glittemaskinur
· Bjálkavibrator
· Stavivibrator
· Betongslípimaskinur

og mangt annað

Søla & útleigan

Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

TVANGSBLANDARI
300 litrar (1 sekk) ynskist til keyps.
Tlf. 253103 ella 217790

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
17 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 253321

ARBEIÐI YNSKIST
Tvær gentur 14 og 15 ár søkja arbeiði aftan á skúlatíð í Havn.
Ring tel. 257879

ALT TIMBURARBEIÐI
og umvælingarbeiði verður gjørt. Sp/f KJ-Bygging,
Tlf. 211828

YMIST FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er hondverkari.
Tlf. 310362

ARBEIÐ YNSKIST
19 ára gomul genta ynskir arbeiði skjótast gjørligt. Helst við børnum ella handilsarbeiði. Tit kunnu ringja
Tlf. 316975 ella 252638

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri 16 ára gomul genta, ið søki arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 315137, spyr eftir Sáru

Barnaansing

ÁLÍTANDI GENTA/KONA
søkist at ansa 2 børnum skjótast gjørligt. Ring á
tlf. 310431 ella 261435 e. kl. 18

HEY!
Manglar tú onkran at passa børnini hjá tær, ert tú vælkomin at ringja til mín – eg eri búsitandi í Lamba.
Tlf. 260202

VÁGUR: UNG PIGE
søges til dansk familie med 3 børn – 6, 5 og 3 ár. Løn, kost og logi, godt værelse og gode arbejdsforhold.
Tlf. 373023

Barnaútgerð

TIL SØLU
Tremmusong við madrassu bíliga til sølu.
Tlf. 447451

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Simo barnavognur við regnslag og fluguneti til sølu fyri kr. 2.500. Bert brúktur til 1 barn.
Tlf. 319859

GRÁUR SCANDIA
barnakoyristólur til sølu fyri 900,- kr.
Tlf. 319897, eftir kl. 18

TVÍBURAVOGNUR YNSKIST
Tvíburavognur ynskist til keyps nú ella í apríl/mai.
Tel. 321242 eftir kl. 17

SIMO BARNAVOGNUR
Bláur Simo barnavognur árg. nov. 2000, við lufthjólum, regnslag, selum og fluguneti. Nýprísur 5.800 kr. til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 222841

TIL SØLU
Vælhildin, myrkabláur 1 ára gamal koyristólur við regnslag til sølu.
Tlf. 319655 ella 258500

TIL SØLU
Marinblá babylyft, baby skrástólur og beriseli, bíliga til sølu.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Scandia barnastólur, gráur, 900 krónur. Puslipúta er við í keypinum.
Tlf. 319897, e. kl. 18

TIL SØLU
Vælhildin 1 ára gamal BRIO barnavognur og vælhildin BRIO koyristólur til sølu.
Tlf 310801/222127

TIL SØLU
Óbrúkt IKEA skáp og reol við puslborði til smábarnakamar, – ongantið samansett, til sølu fyri 1400 kr.
Tlf. 319112 e. kl. 17.00

Bátaútgerð

TIL SØLU
6-mannafarið »Jarnbardur« úr Havn, ið var bygdur av Hanusi Jensen 1990, verður lýstur til sølu um nóg høgt boð fæst. Báturin hevur m.a. 6 FM-heiti. Mynd á www.KRF.fo. Møguleiki er eisini at keypa 8-mannafarið »Knørrur«. Hoyr nærri á 310055/250118 ella skriva til
jannie_d@hotmail.com

YNSKIST TIL KEYPS
10-mannafar ella stórri við veiðuloyvi, ynskist til keyps.
Tlf. 251492

KAPPRÓÐRARBÁTURIN
Lómur, 6 mannafar til sølu.
Argja Róðrarfelag, tlf. 214159 ella 219981

TIL SØLU
Glastrevjabátur, bygdur í Bø, útgjørdur til línu- og snelluveiðu, við nautiskari útgerð, til sølu um hóskandi boð fæst. Fiskiloyvi.
Tlf. 214406

Bingo

FRÁ EYDNUNI
Gott páskabingo verður sunnudagin 17.3. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Eykaspælið 800 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1500 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT PÁSKABINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 17. mars kl. 16. Á lutaseðli 2 stór, føroysk páskaregg og 3 x 1000 kr. Bingola og eyka spæl. Koyring heim.
Kiwanisklubburin Rósan

BINGO
verður í VB-húsinum tórsdagin 21. mars kl. 16.00.
Vágs Bóltfelag

BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 14. mars kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2x500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Páskaegg til rekkju. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

KØKUTOMBOLA Í SMS
Amnesty International hevur køkutombola á torginum í SMS fríggjadagin 15. mars og leygardagin 16. mars. Tiltakið byrjar kl. 10.00 báðar dagarnar og er opið til handlarnir steingja.
Amnesty International

GOTT PÁSKA DUNNUSPÆL
verður í Ranhøll í Sandvík skírisdag. Nógvir góðir vinningar.
Bygdarfelagið á Rananum

Bøkur

TIL SØLU
Ein rúgva av barnabókum bíliga til sølu.
Tlf. 317810 ella 217810

Burturm. /funnið

FARTELEFON
burturmist í Runavík ella Tórshavn – Ericsson T-18 S. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga
ring 259148 ella 224795

BRILLUR FUNNAR
Brillur v/ metall stelli funnar í J. C. Svabosgøtu hóskvøldið 28. febr. Fáast við at ringja
Tlf. 317807, e. kl. 17

Býli

ÍBÚÐ Í KBH.
fult møblerað, stórur altanur, elevator, vaskikjallari o.a. til framleigu í 6-8 mðr. ella eftir avtalu. 4.300 við ljós og hita. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 373169 ella 250213

PAR
við trimum børnum søkir hús ella íbúð í Norðurstreymoynni. Alt hevur áhuga. Vit eru friðarlig og fara væl um. Roykja ikki. Gjalda til tíðina.
Tlf. 361644

KAMAR TIL LEIGU
til friðarligt fólk, sum fer væl um.
Tlf. 228063

ÍBÚÐ YNSKIST
Ung, friðarlig genta søkir lítla íbúð í Havn.
Tlf. 314687 eftir kl. 18

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru eitt ungt par, ið søkja íbúð í høvuðsstaðarøkinum. Bæði hava fast starv, eingi børn, friðarlig, drekka ikki, roykja ikki og fara væl um. Alt hevur áhuga.
Vinarliga ring tlf. 260165 og 254741

HUG AT FLYTA
til Danmarkar. Ella er tú ofta reisandi ímillum DK og FO og manglar tú tá nakað at búgva í? So havi eg eini eittplans hús tætt við Límfjørðin. Um áhugi er, havi eg eitt stórt verilsi við atgongd til køk og bað, allir hentleikar og fult møblerað. Bert til 100% edrúiligan persón/persónar. Áhugaðu skrivið til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn
Bill. mrk. 1296-4

HÚS YNSKIST
til leigu í Suðuroy. Alt hevur áhuga. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
Bill. mrk. 747

EINLIG MAMMA
søkir íbúð til rímuligan pris skjótast gjørligt – helst í Havn.
Tlf. 257346

HÚS Í NORÐRAGØTU
til leigu.
Tlf. 441512

TIL LEIGU
Raðhús, 180 fermetrar, nær Keypmannahavn (Nivå), til leigu frá 1/8. Standa 2 min. frá Kystbanatokstatiónini, nær innkeypssentur, barnaskúla, dagstovnar, sandstrond og skóg. Sera barnavinarligt umhvørvi við fleiri spæliplássum.
Tlf. 311430

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki